# Skálafjørðurin hevur møguleika at gera seg

**- Tað sum krevst er, at vit síggja møguleikarnar og taka lógvatak saman, fyri at kunna lyfta uppgávurnar í felag. Gamla orðatakið, at samanhald gevur styrki, ásannast enn í dag. Vón mín er, at vit við felags stevi og við frímóði kunna møta øllum framtíðar avbjóðingum, segði Kári P. Højgaard, løgtingsmaður m. a. í midnáttarrøðuni á torginum í Saltangará á Eystanstevnu leygarkvøldið**



MIDNÁTTARRØÐA

Góðu Eystanstevnugestir
Eftir langan og strangan vetur, har kuldin ikki misti takið fyrr enn um mánaðarskiftið og stormur og vátakavi seinastu dagarnar tók lívið av nógvum lombum, er loksins summarlýðka komin í luftina, náttúran vaknar úr vetrardvala, grasið grør, fuglarnir syngja og skaparverkið takkar skaparanum fyri lívið, at tað eydnaðist okkum enn einaferð at uppliva summarið.

Í hesum døgum er heimsmeistarakappingin í fótbóltið í Týskalandi, og fer hendan kapping í vikuvís at binda milliónir av uppøstum "fótbóltsentusiastum" kring allan heim til sjónvarpsskýggjan. Alt sum ikki er lívsneyðugt at gera, verður lagt á hyllina og má bíða hendan mánaðan, fótbóltsfepurin herjar. Serliga er tað menninir sum fylgja við og eru bundnir til sjónvarpsskýggjan, talan er jú í byrjani um 3 dystir dagliga og hetta krevur nógva orku av áskoðaranum, ið situr í djúpum leðurstóli við cola og chips, ella hann liggur á sofuni og hvílir seg til næsta dyst. Tað krevur somuleiðis nógv av familjuni, men fjølmiðlarnir ugga kvinnurnar við, at um tað gongur væl hjá liðinum, ein heldur við, hevur tað positiva ávirkan á menninar og kynslívið. Tíverri, tað verður bert tað eina landið sum gerst heimsmeistari og neyvan verða øll nøgd.

Fótbóltsfepurin herjar so sanniliga eisini herheima, og sjálvdan hevur kappingin í Formula-deildini verið meira spennandi enn í ár. Ongin sjálvsagdur vinnari er og øll liðini hava mist stig. Grannarnir handan Golan-heyggjarnar B68 megnaðu seinasta vikuskifti tað, sum onnur lið hava droymt um, tá teir við einum 3-1 sigri, tóku øll stigini í Klaksvík. NSÍ vann á EB-Streymi fyri aðru ferð í ár, og høvdu skálamenn vunnið á HB, høvdu øll úrslitini lagað seg eftir vild, nú grannarnir norðanfyri, GÍ, við Peturi Mohr á odda liggja nr 1 hesa vikuna. Grannauppgerðin fyrr í kvøld prógvaði hvat er A og B liðið í kommununi hendan mánaðin, og vit anda fremstu liðini í nakkan.

Eins og náttúran skiftir í vár, summar, heyst og vetrarbúna, boða árstíðirnar frá, at tíðin stendur ikki í stað. Tíðarinnar hjól melur og vit fylgja við um vit vilja tað ella ei. Ongin dagur er líkur og hvør einasti borgari hevur sína avbjóðing, har møguleikarnir hjá tí einstaka eru til at gera avreksverk og røkja tær uppgávur, ið er litin hvørjum sær upp í hendur. Her er tørvur á tí einstaka og øll hava fingið sína talent, tú ert týdningarmikil og samfelagið hevur brúk fyri tær.

Eysturoyggin hevur altíð verið vinnuoyggj burturav, og alt tað eg minnist hevur nógv skipaferðsla verið inn og út av Skálafjørðinum, eins og nógv skip nýttu ankarplássið yviri undir Ringunum til vetrarhvíld. Slóðarar tóku risatøk og keyptu skip, har avleidda virksemi skapti nógv arbeiðspláss á landi.
Hendan tíðin er farin og kemur ikki aftur, men um fáar vikur verður aftur virksemi við Kongshavn, tá útgerðarskipini fara at sigla út og inn við farmi, tí enn ein leitiboring verður framd. Vónandi fer boringin at staðfesta, at olja í rakstaraverdum nøgdum finst í føroyskum øki, og kann geva okkum enn eitt bein at standa á búskaparliga.

Sum sagt gamla tíðin er farin og ein nýggjur dagur við nýggjari manning er veruleiki. Har sum p/f Klement Petersen og Højgaard´s eft. borgaðu fyri kvalitetinum, eru hesir avloystir av duoini Knudsen & Nielsen. Eitt føroyskt orðafelli sigur, at trøðini vaksa ikki inn í himmalin, men tá talan er um at keypa og selja fyritøkur sum handla við timbri, er hetta ein onnur søga. Tað ásannaði Eivind Jacobsen, tá hann bleiv endurgivin í bløðunum fyri at siga. "Tey sum kenna meg og Símun vita, at vit selja dýrt"..

Rodmundur hevur ásannað at borgarstjórasessurin er ov krevjandi at røkja afturat nógvum øðrum uppgávum, sjálvt um "dampurin er uppi". Frá mær skal hann fáa tað skoðsmál, og eg tori at siga tað vegna eitt samlað býráð, at hann hevur verið ein virkin og dugnaligur borgarstjóri. Tað verður spennandi at síggja, hvussu hann í býráðsarbeiði fer at trívast sum vanligur matrósur undir hóvligu og jarðbundnu leiðsluni hjá Hans J. Lamhauge, ið við drúgvu royndum sínum, av einum samdum býráði fekk álitisváttan at yvirtaka róðrið. Tøkk fyri Rodmund; góða eydnu og signing í álitisstarvi tínum framyvir Hans Jákup.

Orðatakið sigur, at maður kemur í mans stað, tó ein saknar nakrar kvinnur í fremstu røð, tá talan er um at slóða fyri. Søgan hevur prógvað, at kvinnur eins væl, um ikki betur enn menn, megna at stýra land og kommunu. Marita Petersen sáli var floksformaður og eitt skifti løgmaður, vit minnast avrik hennara við virðing. Løgtingslimurin Lisbeth Petersen var somuleiðis floksformaður og hevur drúgvar royndir í politikki, fólkatingslimur, bleiv fyrsti kvinnuligi borgarstjóri í Havn, fyri at nevna nøkur dømi.
Jú sanniliga duga kvinnurnar og liva fult upp til ábyrgdina í fremstu røð. Hetta var ikki áskoðanin hjá veljarunum her seinasta kommunuval, har kvinnuliga umboðanin sum hevði verið tvær minkaði niður í null, og nú eru tað einans menn sum mynda Runavíkar Býráð.

Hetta er tíðin tá summarstevnurnar seta sín serstaka dám á vikuskiftini.
Eystanstevnan í ár er tann 45 í røðini og man skráin til hesa stevnuna verða ein tann fjølbroyttasta. Nógv fyrireiking skal til fyri at fáa alt at ganga upp í eina hægri eind og Runavíkar Kommuna hevur ruddað og fríðkað býin saman við privatfólki og skúlabørnum. Fyri at taka ímóti teimum mongu stevnugestunum.

Eg var nærum 10 ára gamal, tá fyrsta eystanstevna varð hildin, og tær fyrstu stevnurnar høvdu ikki so nógv tilboð sum nú, men eg minnist togtogan, kappróður, kajakróður, hondbólt, útimøti og um kvøldið dansur í Glyvra Bio. Hetta var lítið av miklum samanlíkna við í dag, men øll